## Fleiri innbrot á Vágum

Fýra innbot hava verið í Vágum í nátt. Brotið er inn í Sandavágs Timburhandi, Effo í Sørvági og í FK og Mylluna í Miðvági. Enn veit poliitið ikki, hvat er stolið, men líkt er til, at leitað hevur verið eftir peningi. Politiið í Vágum hevur fingð hjálp frá kriminaldeildini í Havn til at kanna innbrotini, og poliitið sigur seg hava góð spor at ganga eftir. Fleiri unnbrot hava í seinastuni verið í Vágum.



## Eftirlýsa bil

Ein svartur Peugeot varð í nátt stolin í Tórugøtu í Havn. Politiið leitar eftir bilinum, sum er stolin onkuntíð í nátt. Bilurin er ein Peugeot við nummarplátuni PV 926. Bilurin stóð uttan fyri bústaðin hjá eigaranum, sum hevði verið gáloysin og latið bilin standa ólæstan við lyklunum í.

# Fiskifrøðiligu tilmælini sk

**- Tað er eingin loyna, at høvuðstrupulleikin við føroyskum fiskavørum í Bretlandi liggur í teimum tilráðingum, sum havgranskingarstovnurin ICES hevur viðvíkjandi veiði undir Føroyum. Tað eru hesar tilráðingar, sum skapa alla balladuna. Skuldu Føroyar fylgt tilráðingunum hjá ICES, hevði veiðan eftir ávísum fiskasløgum verið steðgað, og tað hevði verið ein vanlukka fyri Føroyar**



FISKIVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikudagin setti Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, tríggjar munnligar fyrispurningar um fiskivinnu og fiskivinnumál.

Í fyrsta lagi spurdi løgtingsmaðurin, hvørji stig politiski myndugleikin saman við vinnuni higartil hevur tikið fyri at kunna útlendskar keyparar av føroyskum fiskavørum, at vit fiska burðardygt.

Í øðrum lagi spurdi hann, um landsstýrismaðurin veit, hví hýsa, sum er fiskað undir Føroyum, verður boykottað, meðan hýsa veidd undir Íslandi verður roknað sum burðardygg veiða, hóast hon ikki hevur góðkenning.

Í triðja lagi spurdi Kári P. Højgaard, hvørji stig landsstýrismaðurin fer at taka til tess at samskipa vitanina og frøðina á sjógvi og landi, so tilmælini til politisku skipanina eru greið, og at vit saman úteftir kunnu marknaðarføra eina burðardygga fiskiveiði.

### Veiðan burðardygg

Í sínum svari, segði landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard, at hann hevur havt samráðingar við bæði bretskar politikarar og ES-myndugleikar um hesi viðurskifti, og tí segði hann seg meta, at hann politiskt hevur gjørt tað, sum gerast kann at byrgja uppfyri boykotti av føroyskum fiskavørum í Bretlandi.

Bæði Bretland og í størri høpi eisini ES hevur víst stóran áhuga fyri føroyskari fiskivinnu og føroysku fiskiveiðiskipanini.

Landsstýrismaðurin segði, at føroyska fiskiveiðan er burðardygg, tá havt verður í huga, at nógvir dagar í skipanini, sum myndugleikar saman við vinnu og fiskifrøðiligari ráðgeving settu út í kortið, ikki verða brúktir.

Men hvussu ber tað tá til, at veiðitølini eftir ávísum fiskasløgum eru so vánalig?



*Kári P. Højgaard spurdi landsstýrismannin í fiskivinnumálum um trupulleikarnar við føroyskum fiskavørum í Bretlandi*

Svarið er, at upp-og niðurgongd altíð er í fiskiveiði, skiftandi millum ymisku fiskastovnarnar. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað altíð at vera.

### Alt til sættis

Okkara fiskiveiðiskipan byggir á dagatal og ikki á kvotur, og tí kemur alt til sættis, sum veitt verður. Eingin fiskur verður blakaður deyður í havið aftur. Hetta kann so aftur vera ein orsøk til, at ein partur av veiðini er smáur fiskur, men í øðrum londum, har veitt verður eftir kvotuskipan, hava teir í staðin stórar trupulleikar við útblaking av smáum fiski.

Landsstýrismaðurin vísti í sínum svari á, at okkara stovnsrøkt verður skipað við ásettum dagatali, friðaðum økjum og leiðum, gýtingarfriðingum, bráðfeingisveiðibanni, tá ov nógvur ungfiskur er uppi í veiðini – og við ásetingum um meskastøddir, sum eru størri, enn vit vanliga kenna um okkara leiðir.

Haraftrat kemur, at tá veiðan er vánalig ella, tá fiskaprísirnir eru óvanliga lágir, minkar veiðan eisini, tí áhugin fyri at loysa skip og bátar gerst minni.

### Nøgdur við svar

Kári P. Højgaard sigur seg vera rímiliga væl nøgdan við svarið hjá landsstýrismanninum, tá havt verður í huga, at hetta var ein munnligur fyrispurningur.

- Tað er undrunarvert, at